# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Jens av Reyni 65 ár

Sunnudagin 4. januar 2009 fylti Jens av Reyni hýruvognsførari í Havn 65 ár.

Jens er havnarmaður, sonur Laurentzu og Jens Paula av Reyni.

Hann er útbúgvin húsasmiður og hevur arbeitt í byggivinnuni og hjá pápanum á Fiskacentralinum á Vestaru Bryggju í Havn. Hann koyrdi hýruvogn eitt skifti í 70-unum, og síðan 1986 hevur hann koyrt fast við egnum hýruvogni á bilstøðini Auto. Jens er giftur við Linu, f. Frawley, úr Fuglafirði.

Umframt vanligu hýruvognskoyringina hevur Jens eisini aðrar uppgávur. Hann hevur t.d. í nógv ár havt gott samstarv við Sosialin, og er hann altíð góður at heita á, tá okkurt er, sum skal koyrast út frá húsinum ella heintast, umframt aðrar uppgávur í húsinum. Hann er stillførur og álítandi.

Starvsfólk og leiðsla á Sosialinum ynskja honum tillukku við føðingardegnum og alt tað besta í framtíðini.



†

Okkara kæra kona, mamma, omma, langomma og vermamma

**Gunda Djurholm**
úr Kollafirði

andaðist fríggjakvøldið 2. januar, 91 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Kollafjarðar kirkju týsdagin 6. januar, kl. 13.00.

*Fyri tey avvarðandi*
**Niels Pauli**
**Ingrid, Arnóra, Hans og Bjarni**

## Tøkk

Hjartaliga takk fyri til øll, ið sýndu samkenslu, tá kæri maður, bróðir og svágur

**Malberg Vang**
Froðba

andaðist og varð jarðaður.
Takk til Jónsvein Bech fyri troystarrík orð í kapellinum og í kirkjuni.
Tøkk til kirkjutænarar, sangarar og berarar.
Tøkk til tykkum øll, sum hjálptu til við jarðarferðini.
Tøkk fyri blómur, kransar og gávur til Hjartafelagið.

Samstundist ynski eg tykkum øllum eitt gott nýggjár, og Harrans signing í tí nýggja árinum.

*Fyri tey avvarðandi*
**Jonna Vang**

Fyri 35 árum síðan:

# Fiskaklettur ásigldur og sakk í 1974



Fyri 35 árum síðan, í januar 1974, fór hendan hending fram innan fyri Molan í Havn.

Eingin mansskaði hendi, tá 50-tons báturin Fiskaklettur av Oyri, sum var á veg inn á Havnina, varð ásigldur tætt innan fyri Molan av farmaskipinum Arnatindi, sum var á veg úteftir.

Stoyturin hendi um skottið millum maskinrúmið og lastina. Tað eydnaðist manningini á Fiskakletti at bakka bátin inn at Molanum og leypa upp á land við endum, áðrenn báturin sakk niður við bryggjuna.

*Kelda: Myndaárbókin árið ið fór 1974*

**Dagurin**
**5. januar. Símeon.** Halgimenni úr Kilikiu í Lítluasia, sum doyði í árinum 459. Fekk navnið Stylites, tá ið hann í 422 fekk sær tilhald á einari 6 alin høgari súlu. Súla eitur stylos á grikskum. Hebráiska navnið Shimon er av somu rót sum navnið Sámuel og merkir lítli Sámal
*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum)*

Sosialurin i Sosialurin
Sosialurin Sosialurin